KPMG

Starvsfólk
til skatta- og avgjaldsøkið

Virksemi okkara innan skatta- og avgjaldsøkið er støðugt vaksandi. Vit hava tí brúk fyri einum starvsfólki afturat, sum burturav skal arbeiða við skatta- og avgjaldsspurningum.

Starvslýsing
Arbeiðið fevnir um ráðgeving og tænastur innan skatta- og avgjaldsøkið. Innan **skattaøkið** fevna uppgávurnar um ymiskar skattligar spurningar viðvíkjandi

- persónum
- feløgum
- grunnum
- deyðsbúgvum v.m.

bæði sæð í mun til innanhýsis føroyskar skattareglur og í mun til tær tví-skattaavtalur, sum Føroyar hava við onnur lond.

Á **avgjaldsøkinum** er serliga talan um viðgerð av ymsum spurningum um meirvirðisgjald.

Tær einstøku uppgávurnar verða vanliga loystar í samarbeiði við grann-skoðararnar.

Fleiri av uppgávunum verða loystar í samstarvi við KPMG skrivstovur og aðrar grannskoðarafyritøkur í øðrum londum, serstakliga í Danmark, Íslandi og Noregi.

Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt starv, har rætti umsøkjarin hevur høvi at seta sín dám á starvið.

Umsøkjarin
Tann, ið settur verður, skal hava

- hóskandi ástøðiliga útbúgving
- viðkomandi arbeiðsroyndir
- lætt við at samstarva
- evni at samskifta í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum

Roknað verður við at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, um tørvur er á tí.

Lønin verður ásett eftir útbúgving og royndum.

Umsóknin
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 15. desember 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Súna Schwartz Jacobsen á telefon 34 34 34.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

KPMG

Vit eru 25 starvsfólk, herav 2 statsaut. revisorar, 3 cand.merc.aud., fleiri við HD og á veg til HD og cand.merc.aud., og ein við serroyndum innan edv.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f, sum er føroysk ogn burturav, er limur í KPMG International, eitt av heimsins størstu samtøkum av grannskoðarafyritøkum við meira enn 100.000 starvsfólkum til samans.

KPMG veitir tænastur innan grannskoðan, roknskap, fíggjarstýring, skatt og mvg, og aðrar serligar tænastur á hægsta góðskustigi.

Endamálið við KPMG International er, at kundar hjá KPMG í gjøgnum samstarv millum grannskoðara-fyritøkur kunnu fáa somu tænastur og somu høgu góðsku um allan heimin. Limaskapur okkara í KPMG ger eisini, at bæði vit og kundar okkara kunnu fáa beinleiðis samband við serdeildir í stórum útlendskum grannskoðarafyritøkum.

KPMG í Føroyum hevur ein góðan og breiðan kundaskara við bæði stórum og smáum kundum innan handil, ídnað, fíggjarstovnar, kommunur og stovnar undir landinum.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

teum85

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3253 Navn: Sp/f Frá 30. oktober 2001

Adressa: SMS, Trapputrøðin, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 30.10.2001
Viðtøkudato: 30.10.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: P/F Griffilin, Trapputrøðin, 100 Tórshavn (P/F 1825)
Stjórn: Kári Justinussen, Tórugøta 18, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 30.10.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað virksemi, sum hevur samband við hesa vinnu.

Skráseting Føroya tann 6. november 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3267
Navn: Sp/f A.M.A.
Adressa: Fútalág 1b, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 08.11.2001
Viðtøkudato: 08.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Sp/f Matr. Nr. 677a, Fútalág 1b, 100 Tórshavn (Sp/f 2298).
Stjórn: Andreas M. Andreasen, Ægishædd 1, Box 3061, 110 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 16. november 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3269
Navn: Sp/f Tannlæknin
Adressa: Hoyvíksvegur 39, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 08.11.2001
Viðtøkudato: 08.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Eirikur Hofgaard, Hoyvíksvegur 39, 100 Tórshavn.
Stjórn: Eirikur Hofgaard, Hoyvíksvegur 39, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Agnar á Dul, Gerðagøta 31, Box 15, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 08.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er keyp og søla og veitan av heilsutænastum, serliga innan tannrøkt.

Skráseting Føroya tann 16. november 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2961, P/F JFK Seafood, 700 Klaksvík.

Viðtøkur broyttar: 17.10.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 7.500.000,00 til kr. 23.100.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 7.500.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 19. november 2001

Kristin Balle

Stuðul til uppihaldspening

Umsókn um stuðul til uppihaldspening saman við kvittan fyri goldnan pening fyri seinra hálvár 2001 skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi hin 5. desember 2001. Peningurin verður avgreiddur hin 20. desember 2001.

Almannastovan
Postboks 3096
110 Tórshavn

Skattalistin fyri 2000

Skattalistin fyri Sørvágs kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 19. nov. til 15. des. 01.

Sørvágs Kommuna

Sosialurin Sosialurin Sosialurin

www.sosialurin.fo

Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 20. november 2001, við heimild í grein 26 og 28 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

Impregneringarvirkið sp/f 20/4-1994 á Norðskála

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2 hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

Heilsufrøðiliga starvsstovan

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2032, Sp/f Marita Weihe, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 03.07.2001.
Nýtt navn: Sp/f Arkitektar 99
Stjórn:
Innkomin sum stjóri: Jóhann Laksafoss, Høvdagøta 3, 160 Argir.
Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjórunum í felag.

Skráseting Føroya tann 19. november 2001

Kristin Balle

Útbjóðing

Vegna Tórshavnar havn verður biðið um tilboð uppá at víðka havnarøkið á Viðarnesi vestureftir. Arbeiðstakarin skal sjálvur útvega grót. Arbeiðið skal gerast í tíðarskeiðinum januar til marts 2002. Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til Landsbyggifelagið í seinasta lagi mikudagin tann 28. í hesum mánaðinum.

Tilboð í afturlatnum brævbjálva merktur »Viðkan av havnarøki á Viðarnesi« skulu vera Landsbyggifelagnum í hendi í seinasta lagi mikudagin 12. desember 2001 kl. 14.00.

Lisitatiónin verður á skrivstovu okkara 12. desember 2001 kl. 14.00.

Landsbyggifelagið P/f
Grønlandsvegur 5
Postboks 228
FO-110 Tórshavn

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Þ/F 2654, P/F Farex, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 29.06.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 100.000,00 til kr. 600.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 100.000,00 til kurs 200.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Rói Egholm, Hagagøta 6, 160 Argir (formaður).
Innkomin í nevndina sum formaður: Kaj Leo Holm Johannesen, á Teigi 6, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Kaj Leo Holm Johannesen, á Teigi 6, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Rói Egholm, Hagagøta 6, 160 Argir.

Skráseting Føroya tann 19. november 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2794, Sp/f Vest-Line, 370 Miðvágur.

Viðtøkur broyttar: 28.09.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 9.000,00 til kr. 109.000,00.
Flokkar: A kr. 72.667,00 og B kr. 36.333,00.
Inngjaldingarháttur: Kr. 6.000,00 við skuldarumskifti til kurs 14.525,9 og Kr. 3.000,00 við skuldarumskifti til kurs 64.282,32.

Skráseting Føroya tann 19. november 2001

Kristin Balle

http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Matstovan Atlantis
leygarkvøldið 24. november
Kalt borð
aftaná verður
dansur við
TAXI
Kostnaður
Kr. 295,-
Borðbílegging á tlf. 31 75 00
Hótel Føroyar

Lýsið
við
brúktum
bilum
Sosialurin
www.sosialurin.fo

FÚTASTOVA
KONGABRÚGVIN
TLF. 322175
Nógvir nýggir stólar
Gávuna til hann/hennara
ið eigur alt
Vit hava opið: mánadag-fríggjadag 11-17.00
leygardag 10-14.00

P/F Restoffs
ASSU